## Skulu ikki keypa rakettir

Íslendski politikarin Jón Magnússon, sum umboðar frælslynta flokkin í Altinginum, mælti um vikuskiftið íslendingum frá at keypa rakettir til hetta nýggjárið. Tingmaðurin helt, at í hesum døgum hava íslendingar fyri neyðini at spara, og hann helt tað vera at spilla pengar burtur at skjóta teir upp í luftina. Umframt rakettirnar mælti tingmaðurin íslendingum til at drekka minni sodavatn. Her kann verða lagt afturat, at Jón Magnússon var eitt skifti formaður í íslendska brúkarafelagnum.



## Útróðrarbátur á land

Ein útróðrarbátur úr Vestmannaoyggjunum fór á land á Heimaey tíðliga gjáramorgunin. Boð vórðu send eftir bjargingarfelagnum í Vestmannaoyggjunum, og tað sendi bjargingarbátin "Þór" til hjálpar. Tað eydnaðist bjargingarbátinum at toga útróðrarbátin av aftur og at bryggju. Tað vísti seg, at útróðrarbáturin, sum eitur "Hlöddi", hevði trupulleikar við sjálvstýraranum. Tveir menn vóru við bátinum, og teir sluppu frá tilburðinum uttanb mein, skrivar Vísir.



*Føroya Skipara-og Navigatørfelag heldur sín árliga aðalfund í Norðurlandahúsinum í dag*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

rødd, men ein avleiðing av slíkum tiltøkum kundi lættliga føra til, at FSN kom undir endurgjaldsábyrgd fyri brot á friðarskylduna í sáttmálaskeiðinum.

- Fiskimannafelagið hevði longu stevnt reiðarínum og hevði framt arrest í skipinum, so limir teirra høvdu tryggjað sær hýrumunin, um teir fingu viðhald í rættinum. Enn er tó eingin úrskurður gjørdur í hesum máli. Skipið er nú selt av landinum, og eftir okkara fatan varð tað heilt óneyðugt við hesum verkfalli.

Eyðstein Djurhuus segði, at FSN kortini vil átala, at føroyskir fiskimenn vildu bróta blokaduna hjá Fiskimannafelagnum.

Einastu limir í FSN, sum vóru við Carlton, vóru skipari, 1. stýrimaður og 2. stýrimaður, og eingin ósemja varð um teirra lønarviðuskifti.

- Tann mest grundleggjandi spurningurin í hesum máli er, um reiðarar kunnu seta fólk uppá aðrar avtalur, enn sáttmálan við Reiðarafelagið sigur, men hesin spurningur er ikki svaraður enn, legði formaðurin í FSN aftrat.

# Allur sáttmálabygnaðurin rillaði undir oljukreppuni

**- Vit vilja takka Fiskimannafelagnum og Maskinmeistarafelagnum fyri gott samanhald, tí veruligur vandi var fyri, at allur sáttmálabygnaðurin fór fyri einki undir oljukreppuni, sum var, segði Eyðstein Djurhuus á aðalfundinum í morgun**

AÐALFUNDUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Eyðstein Djurhuus, formaður í FSN, nam eisini í síni frágreiðing í morgun við oljuprísirnar, sum hava verið rættiliga høgir ein stóran part av hesum árinum.

- Prísurin á olju hækkaði óvanliga nógv miðskeiðis í árinum. Trupult var at fáa lønandi rakstur hjá fleiri skipabólkum. Reiðarafelagið ynskti at fáa samráðingar við manningarfeløgini við grundarlagi í oljuprotokolatinum. Ført varð fram, at um manningarfeløgini ikki vildu samráðast, metti Reiðarafelagið seg at vera frítt stillað til at samráðast beinleiðis við einstøku manningarnar.

Eyðstein segði, at hesa støðu ynskti FSN ikki at koma í.

### Ørkymlaðir reiðarar

- Eftir tveir samráðingarfundir góvu manningarfeløgini Reiðarafelagnum eitt tilboð fyri skipabólkin, lemmatrolarar. Feløgini góvu tilsøgn um, at býtisprosentið restina av sáttmálaskeiðnum varð sett til 26%. Feløgini góvu eisini tilsøgn um at gera líknandi avtalu fyri aðrar skipabólkar. Eisini varð kravt av Reiðarafelagnum, at teir skuldu nokta limum sínum at taka upp samráðingar beinleiðis við einstøku manningarnar um høgu oljuútreiðslurnar.

Eyðstein segði, at Reiðarafelagið var eitt sindur ørkymlað av uppskotinum hjá feløgunum, men tá nakað varð fráliðið, søgdu teir nei takk.

- Síðan hava vit einki samskifti havt um oljuprotokollatið, og okkum vitandi vera allir sáttmálar fylgdir, legði hann aftrat.

### Takkaði feløgum

Formaðurin í FSN fegnaðist um, at oljuprísurin tíbetur er lækkaður munandi, men protokolatið er enn í sáttmálanum.

- FSN ynskir at takka Fiskimannafelagnum og Maskinmeistarafelagnum fyri gott samanhald, tí veruligur vandi var fyri, at allur sáttmálabygnaðurin fór fyri einki undir oljukreppuni, segði Eyðstein Djurhuus á aðalfundinum í morgun.

# fiskivinnupolitikk

av uppskotinum.

- Tá bæði løgmaður og fiskimálaráðharrin nevndu henda ætlaða niðurskurð sum størsta frambrot fyri føroyska vinnu síðan avtøkuna av einahandlinum, vóru vit mong, sum øtaðust. Um uppskotið varð sett í verk, soleiðis sum tað fyrilá, hevði allur heimaflotin komið í stórar trupulleikar. Hetta hevði verið mønustingurin omaná torføru støðuna, sum vinnan var í orsaka av minkandi fiskiskapi, høgum oljuprísum og hækkandi rentu.

Eyðstein segði, at endaliga úrslitið gjørdist ein munandi minni niðurskurður, eins og friðingarnar vórðu óbroyttar.

- Vit hava ongan áhuga í, at fiskidagatalið ella skipatalið er so høgt, at eingin fær lønandi rakstur. Men vit sakna ein skipaðan politik, sum hevur til endamáls at minka skipatalið samsvarandi fiskidagatalinum. Tá fiskidagatalið verður lækkað, fáa øll skip trupulleikar, og skipini mugu so sjálvi royna at keypa frá hvørjum øðrum. Hetta kann vera torført, tá allir hava ov fáar dagar framanundan.

Formaðurin í FSN segði, at fiskivinnupolitikkurin má skipast soleiðis, at tilber at fáa tey elstu og mest ótíðarhóskandi skipini burturúr flotanum, og soleiðis geva meira rúmd fyri teimum, sum eru eftir.

**Takk**

Eg vil hjartaliga takka øllum, sum mintust meg á 70 ára degnum.

Somuleiðis vil eg eisini ynskja vinum og kenningum eini gleðilig jól og eitt av Harranum signað nýggjár.

**Heilsan**
**John Oluf Jacobsen**